# Tjóðarsymbol og tjóðarbygging Nationalstaturin sum eitt tvítýtt fyribrigdi

**BERGUR HANSEN**
Seinni partur





Nationalstaturin sum harðrent amboð

Tjóðarlig symbol eru kollektiv savningarmerki, sum eru ætla at sjóða fólk saman og skapa samleika. Fólk og tjóð eru ikki altíð tað sama, og her hevur nationalstaturin ofta roynst harðrendur mótvegis teimum, sum vóru innan fyri mark, men sum ikki passaðu so væl inn í myndina av tjóðarsamleikanum. Í Svøríki brúkti svenska stjórnin fleiri hundrað ár uppá at forsvenska fólkið í Skåne, Halland og Blekinge eftir at hesir fyrrverandi donsku landspartar vóru hertiknir af Svøríki í 1658. Hetta var ein liður í royndunum hjá flestu evropeisku statunum at skapa samsvar millum hugtøkini statur og tjóð við at "nationalisera" teir ymisku etnisku bólkarnar, sum livdu innan fyri landamark. Eitt hent amboð í hesum politikki hevur verið nógv brúkt tjóðarsymbol og royndir at skapa nýggj tjóðarsymbol, sum kappandi politisku flokkarnir hava verið ídnir at brúkt, tá teir skuldu venda sær til veljarnar. Endamálið við hesari agitatión hevur ikki verið serstakt tjóðarlig, men av tí at tjóðarsymbol eru vælegnað til kensluliga manipulatión hevur hetta verið hent amboð í stríðnum um maktina.

## Nationalisma og seksualitetur

Tjóðarsymbol og tjóðskaparkensla skapa tryggleika. Inge Adriansen undirstrikar, at tekur tú rættin til tjóðskaparkenslu frá fólki, so vendir hon aftur sum ódjór - á sama hátt sum listamaðurin Goya á sinni segði um skynsemi, at tá skynsemið svevur verða ódjór skapt. Nationalisma er vandamikil og ofta trongskygd og sær sjálvari nóg mikið, men vandamikid er eisini at ignorera ta felagsskapskenslu hon ber í sær. Adriansen nevnir í hesum sambandi samdømi millum nationalitet og seksualitet. Tað er við tjóðskaparkensluni sum við seksualitetinum. Tad vandamikla vid seksualitetinum var ikki - sum fólk annars hildu - sjálvur seksualiteturin, men - sum Freud segdi - burturtroðkanin av seksualitetinum. Hetta ikki sagt fyri at gera nationalismuna harmleysa, hon er lívshættislig, tá hon við orðum William Heinesens vísir síni "fædrelandssyge øjne", men hon blívur ofta lívshættislig, tá felagsskapskenslan verður beind av vegnum. Tað var hetta, sum hendi beint áðrenn Hitler kom til maktina. Undanfarna keisaratídin skuldi troðkast burtur undir Weimarrepublikkini 1919-1933, og tað endaði við einum tómrúmi, har tjóðarsymbol blivu troðka burtur við tí úrslitið at ódjór komu til maktina. Ella sum Ulrich Beck sigur: "Det nationale bliver monopoliseret af ekstremister, hvis de moderate negligerer det".

Einoygd nationalisma hevur gjørt, at nationalismu-granskarar vanliga leggja sjógv millum seg og allan tann symbolheim, sum loðar uppi við tjóðini. Í bókini Nationale symboler er ger Inge Adriansen greitt, at hon ikki meinar, at hesin hugburður er haldgóður, tí tað er ein grundleggjandi menniskjaligur tørvur at vilja hoyra til ein felagsskap. Hon vísir í hesum sambandi á, at tjóðarligur ella tjóðskaparligur samleiki verður roknað sum universell rættindi og stendur sum artikkul nr. 15 í mannarættindayvirlýsingini, sum ST viðtók í 1948. Nationalisma kann skapa trupulleikar og vanlukkur, men at avnokta kollektivan, tjóðarligan samleika kann eisini volda trupulleikar.

## Hvønn veg peikar reetnifiseringin?

Við hesum tvinnanda týdningi av nationalismu í huga, má spyrjast: hvønn veg peikar føroyska reetnifiseringin, sum vit hava verið vitni til í Føroyum seinastu tíðina?

Kenslan av, at nationalstaturin er við at ganga undir undir stóra trýstinum frá globaliseringini hevur sett sín dám á fakliga og politiska kjakið í 1990-unum. Hesa kenslu kallar Adriansen ta sálarfrøðiligu grundina til øsingina, sum kjakið um innflytarar og tjóðarliga virðisgrundarlagið hevur elvt til allastaðni í Europa. Við ella uttan stat - tjóðin kennir seg hótta av innflytarastreyminum, og hetta hevur givið nationalismuni vind í seglini aftur. Nationalstatirnir er eisini viknaðir av, at maktin so líðandi seyrar úr serliga lóggevandi valdinum og yvir í transnationalar fyritøkur. Tað er onki at undrast á, at soleiðis er vorðið, tí fólk kenna, at tjóðareyðkenni og siðbundna felagsskapskenslan verða kúgað av skjóttgangandi menningini, stórbroytingum í lívsmynstrinum og nøgvum fólki úr fremmandum mentanum.

Við øðrum orðum ein kann skilja nýsprotnu nationalismuna sum eina natúrliga konservatismu. Men er tað nóg mikið at skilja, vera forstandandi mótvegis fólksins reaktión mótvegis nýggju vindunum? Eitt modernað tiltak, sum ofta sæst á sitatplakatum í Danmark ljóðar: "At forstå alt er at tilgive alt". Tað er stuttskygt at taka hetta til eftirtektar. Heldur átti tiltakið at ljóða: "At skilja alt er ikki tað sama sum at fyrigeva øllum". Tað er við øðrum orðum í lagi, at ein skilir natúrligu konservatismuna, tí fólk eru bangin, men ikki í lagi, at ein passivt einans lurtar eftir irratiónellum angistsignalum í staðin fyri at fínstilla antennurnar og venda sær móti veruleikanum sum er.

Í árunum sum koma skal føroyska reetnifiseringin og reaktiveringin av tjóðskaparkensluni standa sína roynd. Er hon bert ein vanlig markering av hátíðarskrúði, eitt postmodernistisk fyribrigdi, eitt mótafyribrigdi, hugnaítrív, sum er sær sjálvum nóg mikið, ein roynd at finna seg aftur og stíva seg av sum føroyingur aftaná eyðmýkjandi bankakreppuárini ella kanska okkurt annað? So hvørt sum mentanarliga globaliseringin við tolsemi og margfeldni á skránni troðkar seg longur og longur inn á Føroyar og fleiri innflytarar av sonevndum fremmandum uppruna fara at søkja um at uppihaldsloyvi og grundstykki kanska eisini í landinum, so fara vit at síggja, hvønn vegin tingini fara at hella. Sum er eru bæði positiv og negativ signal. Kjakið er fríari enn nakrantíð, vil eg halda, tey ungu opnari enn nakrantíð, men skonin á fremmandaótta hevur eisini víst seg í hurðargloppinum. Veingjasløgini frá modernitetinum skapa turbulens beint yvir høvdinum á Billi og Jenisi, men hvat fara føroyingar at siga? Og nú er val eisini.

## Siðbundnir felagsskapir ella hvørji eru 'vit'?

Nationalstaturin er eitt av teimum hugtøkum, sum av álvara er vorðið nýmett seinasta áratíggi. Nationalstaturin er vorðin hartaður fyri at hava eina konservativa fatan av, hvørji 'vit' eru. Tað er ikki vorðið minni torgreint at vera tann ein er og heldur ikki tað vit eru. Minni enn nakrantíð áður kann ein uttan nakað spyrja, hvørji vit eru, tí hvat merkir 'vit'? Er 'vit' teir siðbundnu felagsskapirnir sum familjan, tjóðin og religiónin ella meira modernaðir felagsskapir sum áhugabólkar og tey mongu 'vit', sum sergreiningin hevur alt fram í og uttan fyri 'netið'. Takkað veri internetinum, tí accelererandi mentanini koma menniskju saman meira enn nakrantíð áður. Einstaka menniskjalívi hevur fingið fleiri rúm at spíla seg út innan fyri og upplivir á ein bógvin sergreiningina sum eina frígering frá siðbundnu felagsskapunum, sum kunnu vera tungir at dansa við, og á hin bógvin sergreiningina sum ráðaloysi.

Sergreiningin krógvar hópin av spenningum, har spenningurin millum ein opnan og ein meira avmarkandi innflytarapolitikk er millum teir ráðandi. Innflyting og útflyting fer fram í tjóðum ella londum, men ikki øll lond hava havt eins stóra eydnu at fáa innflytararnar tillagaðar nýggja heimlandinum. Hetta hevur gjørt, at kjakið um innflytarar nógvastaðni er vorðið meira trupulleikaskoðandi enn neyðugt er, og avleiðingin hevur verið, at innflyting sum ein møguleiki hevur havt lítlan ella ongan áhuga. Trupulleikaskoðanin hevur serliga sín uppruna í fatanini av einari tjóðskaparligari eindarmentan, som er vorðin støðugt torførari at tvíhalda um so hvørt sum globaliseringin økir sítt trýst á og hevur broytt fyritreytirnar fyri tilveruni hjá tjóðunum.

**Keldur**

**Adriansen, Inge:** Nationale symboler i Det Danske Rige 1830-2000 bind 1 og 2. Museum Tusculanum 2002.
**Øyvind Østerud:** Hva er nasjonalisme. Universitetsforlaget 1994
**Øyvind Østerud:** Globalisering og nasjonalstaten. Gyldendal 1997
**Benjamin, Walter:** Der Erzähler í "Gesammelte Schriften" II. Frankfurt am Main 1977.
**Tróndur Olsen:** Her er dámligt í Føroyum um krossmessutíð. Greinar, sum Jóhannes Enni hevur savnað og lagt til rættis. Mentunargrunnur Studentafelagsins 1992.
**William Heinesen:** Moder Syvstjerne. Gyldendal 1997.

**ítróttur**

Nr. 25 • fríggjadagur • 6. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Greitt avtalubrot

**- Eg var fullkomuliga óvitandi um, at verandi formaðurin ætlaði sær at stilla uppaftur. Tvørtur ímóti hevði eg fingið greitt at vita frá formanninum, at hann ikki stillaði uppaftur. Hesi boð hava eisini aðrir nevndarlimir fingið.**

FSF-STRÍÐ
*Jákup Mørk*



*- Dánjal Andreasen fekk annars eitt sera drúgt bræv, har vit í smálutum greiddu frá, hvat vit vóru ónøgdir um, sigur Christian Andreasen, sum sigur seg ikki hava annað val enn at fara úr nevndin*

Sum vit hava nevnt tað aðrastaðni í blaðnum, so er nú ein semja gjørd millum verandi FSF-formanninum og avbjóðara hansara. Semjan inniber, at Rúni Heinesen tekur seg aftur sum formansevni til komandi aðalfundin.

Soleiðis tykist Dánjal Andreasen nú at vera einasta valevni, og í øllum førum skal gerast skjótt av, um nýtt mótvalevni skal finnast. Freistin at seta fram uppskot um nýggjan formann er úti á midnátt hóskvøldið.

## Álitið er fokið

Sum kunnugt, so var tað ein meiriluti í FSF-nevndini, sum gjørdi av at skjóta Rúna Heinesen upp til formann. Ein av limunum í meirilutanum, Christian Andreasen, er eftir øllum at døma somikið ónøgdur um gongdina í málinum, at hann nú hevur gjørt av at taka seg úr nevndini. Spurdur, hví hann hevur valt at taka hetta stigið, sigur Christian Andreasen beint út, at hann kann ikki liva við verandi formanninum.

- Sum nevndarlimur havi eg verið við til at taka tað heilt óvanliga stigið at ganga ímóti formanninum, og ístaðin skjóta annan nevndarlim upp sum formansevni. Tá skalt tú so ikki vera serliga beroknandi fyri at gita, at eg ikki havi álit á verandi formanninum. Og verður hann nú einasti kandidaturin til formanspostin, so havi eg einki val enn at fara úr nevndini, sigur hann.

## Ósakligt valstríð

Stríðið, sum nú tók seg upp í nevndini, mundi koma óvart á fleiri feløg. Ikki minst eftir at Dánjal Andreasen á fundi við feløgini gjørdi greitt, at hann ætlaði sær at stilla uppaftur, og at hann ikki visti, hvaðani søgur um tað øvugta vóru komnar.

Hetta er tó nakað, sum Christian Andreasen tykist hava eina heilt aðra fatan av.

- Eg var í øllum førum fullkomuliga óvitandi um, at verandi formaðurin ætlaði sær at stilla uppaftur. Tvørtur ímóti hevði fingið greitt at vita frá formanninum, at hann ikki stillaði uppaftur. Hesi boð hava eisini aðrir nevndarlimir fingið.

- Og tá hann sigur, at hann ikki veit, hvaðani tosið um tað øvugta er komið, so er hetta tað reina tvætl.

- Dánjal Andreasen fekk annars eitt sera drúgt bræv, har vit í smálutum greiddu frá, hvat vit vóru ónøgdir um. Hetta hevur hann so eftir øllum at døma ikki góðtikið, og hesa seinastu tíðina hava vit so verið vitni til eitt spæl, sum eg ikki tími at verða partur av.

Og við hesum sipar Cristian til valstríðið, sum er farið fram aftan fyri leiktjaldið.

- Junglutrummurnar eru av álvara farnar ígongd. Roynt verður at trýsta fólk við líkum og ólíkum. Eitt nú verður eitt fullkomuliga óviðkomandi mál, nevnliga aðalskrivarin, drigin inn í málið, sum er fullkomuliga óviðkomandi í hesum sambandi.

- Tað er at snara málinum, tí á aðalfundinum er tað formannin og ikki aðalskrivaran, sum tað snýr seg um. Alt hetta er drigið niður á eitt slíkt støði, har eg ikki vil verða partur av spælinum meira, og tað havi eg so tikið avleiðingarnar av.

## Persónlig viðurskifti

Millum feløgini ljóðar annars eisini, at ein partur av ónøgdini hjá Christiani Andreasen snýr seg sum, at hann ikki varð valdur sum formaður fyri tveimum árum síðani. Men hetta tykist tó ikki vera nakað, sum nervar sakføraran yvirhøvur.

- Hatta kenni eg als einki til. Eg havi als ongar ætlanir um at gerast formaður í FSF, og trekti meg sjálvboðin í hesum fyri tveimum árum síðani.

- Eg eri so als ikki nakar bittur maður. Eg havi mítt starv í gerandisdegnum, har eg havi nokk at síggja til. Annars má eg viðganga, at tá eg nú í so nógv ár havi havt við Fótbóltssambandið at gera, er tað ein felagsskapur, sum eg eri vorðin góður við, og er hetta eisini ein av orsøkunum til, at eg als ikki kann liva við verandi formanni.

- Annars eru tað eisini onnur viðurskifti, sum eisini gera, at eg ikki havi álit á sitandi formanninum, sigur Christan Andreasen at enda.

# Ikki í miðlarnar

**Virkandi FSF-formaðurin – og tað verður hann helst í øllum førum tvey ár afturat – sigur seg ikki vilja út í nakra almenna diskussión um viðurskifti millum seg og hinar nevndarlimirnar**

FSF-SEMJA
*Jákup Mørk*



*Dánjal Andreasen tykist verða einasta uppskotið til formanssessin, og sjálvur metir hann, at ósemjan í nevndini nú er loyst*

Sterki maðurin í FSF í løtuni eitur Dánjal Andreasen.

Faxið, sum mikudagin seinnapartin varð sent føroysku fjølmiðlunum, staðfestir meira ella minni, at tað eisini verður leirvíkingurin, sum fer at standa við stýrisvølin hjá FSF tey bæði næstu árini, og tá vit hósdagin fingu orðið á Dánjal, tóktist hann so heldur ikki hava nakað ímóti, at stríðið er av á hesum sinni.

Spurdur, hvørt ósemjan, sum hesar seinastu vikurnar hevur verið so sjónlig, nú er loyst, sigur formaðurin, at tað er hon so fyri ein part.

- Í øllum førum er tað væl saktans so, at ósemjan um formansevnið er burtur, sigur hann.

- Og so vóni eg, at vit nú eisini fáa beint aðrar ósemjur, sum hava verið. Tað hevur so ikki verið nøkur loyna, at nevndin hevur gingið í tvíningum í formansmálinum, men gjøgnumgangandi haldi eg tó ikki, at tað hevur verið so galið.

## Ikki í miðlarnar

Spurdur beinleiðis um orðini hjá Christiani Andreasen, um at hann hevði fingið greitt at vita, at formaðurin ikki stillaði uppaftur, vil FSF-formaðurin sum so ikki kennast við hetta.

- Tað, sum tað í sínari tíð snúi seg um, var at eg byrjaði í nýggjum starvi hjá Skipasmiðjuni. Eg segði tá – bæði fyri arbeiðsgevara og FSF – at eg ikki vildi hava, at formanssessurin skuldi ganga út yvir arbeiðið hjá mær, og at eg tí ivaðist í, um at eg fór at halda fram innan FSF.

- Nú havi eg so roynt hetta í nakrar mánaðir, og havi so funnið útav, at tað væl ber til at sameina tingini. Og tí havi eg gjørt av taka eitt tørn afturat.

Men Christian Andreasen sipar eisini til eitt skriv, har hann sigur nevndina hava greitt gjølla frá, hvat teir hava verið ónøgdir um?

- Tað má so standa fyri hansara rokning. Eg havi alla tíðina sagt, at eg fari ikki út í bløðini at viðgera hetta. Tað má vera nakað, sum limafeløgini gera av, og tað hava tey so møguleika til á aðalfundinum

Sosialurin
www.sosialurin.fo